

Skemtiteknarin Óli Petersen í góðum selskapi saman við Edmundi Joensen, løgtingsformanni og Heðini Mortensen, borgarstjóri í Havn Mynd: Jan Müller



Brekkubrothers høvdu útgávukonsert í Miðlahúsinum um ólavsøkuna

Mynd: Jan Müller



Nógvur tónleikur var at hoyra í Miðlahúsinum á ólavsøku - eisini í bakgarðinum var livandi tónleikur

Mynd: Jan Müller

# Ólavsøkuinnrás í Miðlahúsinum

**Fyri fyrstu ferð slapp nýggja Miðlahúsið í Vágsbotni at royna seg á tjóðarhátíð okkara, ólavsøkuni. Og upplatingin av húsinum varð eisini sera væl móttikin. Mong hundrað vitjandi stukku inn á gólvið í Tórsgøtu 1 at síggja framsýningina hjá Óla P og hitta teknaran**

FRAMSÝNING
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Eisini valdu tey at síggja áhugaverda og søguliga filmin frá BBC um Føroyar, sum kendi føroyski myndamaðurin Jákup Andreas Arge hevði fingið hendur á í gomlu myndagoymslunum hjá bretsku miðlafyritøkuni.

Uppaftur onnur høvdu valt sær høvi at síggja og hoyra mongu tónlistafólkini, sum spældu og sungu um alla ólavsøkuna í Miðlahúsinum. Her settu ikki minst Spælimenninir sín serstaka dám á. Men eisini Sigrið Rasmussen og hennara tónleikarar fingu mangar ólavsøkugestir at leggja leiðina í Vágsbotn. Tvey kvøld á rað. Og teir, sum kanska vórðu við til at seta prikkin yvir iið, Brekkubrothers, fingu eina dundrandi móttøku.

Aftrat hesum stóð so eisini ólavsøkugestunum í boði at síggja nýggja Miðlahúsið um somu tíð, sum journalistar og fotografar vóru til arbeiðis og løgdu myndir og greinar út á Portalin hjá Føroya Tele, sum føroyingar nær og fjar hava møguleika at síggja.

Soleiðis gjørdist ólavsøkan í ár eisini ein hátíð fyri føroyingar uttanfyri Havnina, fyri øll tey, sum ikki vóru í Havn stevnudagarnar, men sum høvdu valt at vera heima ella fara út um landoddarnar at njóta summarferiuna.

### 376 vann

Atgongumerkið til mongu tiltøkini í Miðlahúsinum var eisini lutaseðil, har møguleiki var at vinna ein ferð, sum Atlantic Airways hevur latið, millum Føroyar og Danmark. Drigið er, og hepni vinnarin er nr. 376. Tillukku.



Hesa ólavsøkuna var framsýningin av skemtitekningum hjá Óla Petersen í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Øll hini árini hevur hon verið í Smiðjuni í Lítluvík

Mynd: Jan Müller

# Ítøkiligt úrslit av norðurlendskum samstarvi



Mánadagin 18. juni vóru umboð fyri nevndina í Alzheimerfelagnum á fundi við Heðin Mortensen, borgarstjóra, har hann m. a. fekk handað bóklingin: »Góð dagtilboð til fólk við demens«

Hesin faldari er úrslit av norðurlendskari verkætlan, sum hevur fingið stuðul frá Norðurlendska ráðharraráðnum. Arbeiðsbólkurin, ið var samansettur av fakfólki við drúgvum royndum innan demensøki og avvarðandi hjá demenssjúkum, hevur funnið tær bestu skipanirnar, sum eru í norðurlondum. Vegleiðingin, ið faldarin sipar til, byggir á royndir frá dagtilboðum, sum vit hava savnað úr skriftligum tilfari og við at tosa við starvsfólk, sum arbeiða við stutttíðarrøkt, avvarðandi og fólk, ið eru minnisveik.Hann er umsettur til øll tey norðurlendsku málini. Umsett til føroyskt hevur Marna Jacobsen.

Endamálið við faldaranum er at fáa fólk at skilja, hvussu stóran týdning eitt gott dagtilboð hevur fyri fólk við demens, tí at tað stimbrar tey mentalu, likamligu og sosialu virkisevnini. Felags fyri øll norðurlondini er, at alt ov fá skipað dagpláss eru til demenssjúk.

Heftið er ætlað heilsustarvsfólkum, sum arbeiða á dagstovnum ella leggja til rættis góð dagtilboð, áhugafeløgum og teimum, ið hava avgerðarvald. Tað kann eisini vera ein hjálp, tá ið avvarðandi skulu biðja um skipað tilboð til sínar næstringar.

- Fremsta uppgávan hjá Alzheimerfelagnum er at taka sær av áhugamálum hjá teimum minnisveiku og teirra avvarðandi. Við hesum faldaranum royna vit at fáa fólk at skilja, hvønn týdning eitt gott dagtilboð hevur, og vit lýsa okkara sjónarmið, koma við hugskotum og tilmælum um ein góðan og innihaldsríkan gerandisdag við støði í tørvinum og ynskjunum hjá tí sjúka og avvarðandi hansara ella hennara, sigur Alzheimersfelagið.

Faldarin verður sendur stovnum kring landið. Onnur áhugað kunnu venda sær til Alzheimerfelagið, tlf. 313102, ella Miðstøðina fyri minnisveik, tlf. 318102.